# Vanlukkur og hjálpsemi í Hovi

**Hesin partur verður um Hov, sum varð hart rakt, tá ið Karen fór, men eisini árini frammundan. Hetta er eisini ein søga um ta umsorgan, fólk høvdu fyri hvørjum øðrum**

Hóast tað er so long tíð liðin, ber framvegis til at greiða frá, hvussu tað gekst hjá summum av heimunum, sum mistu. Framvegis er børn hjá teimum, sum fórust, á lívi. Tey, sum eru farin, eiga so aftur børn, sum kunnu greiða frá út frá tí, sum teimum sjálvum er fortalt.

Ein av teimum, sum gekk burtur við Karen var Johannes Olaus Nicolaj Hofgaard. Lávus, sum hann var kallaður, var føddur 11. Juni 1874, og gjørdist tískil 46 ár. Hann giftist 28. oktober 1899 við Susanne Maria f. Danielsen, sum var fødd 7. oktober 1874. Ommudóttir hennara Hansina Hammer Olsen, kallað Goje, búsitandi í Syðrugøtu, hevur greitt frá umstøðunum hjá teimum.

### Trina lekti tað, sum læknar ikki kláraðu

Fyrst kann vera nevnt, at Susanna var dóttir Jaspur Danielsen og Katrinu i Meiðlendi. Trina var ein serstøk kvinna, eitt rættuligt konubrot. Serliga var hon kend fyri sítt læknakynstur. Hon grøddi slík, sum til fánýtis gingu til lækna. Dømi er um mann, sum fekk at vita frá læknanum, at armurin mátti takast av. Hetta vildi verið ein vanlukka fyri mannin. Tískil fór hann til Trinu, og hon lekti hann. Tá ið maðurin seinni hittir læknan, undrast hann yvir, at maðurin framvegis hevur báðar armarnar. Læknin fær at vita, hvør ið hevði lekt mannin, og hann meldar Trinu fyri ólógligt læknavirksemi. "Nei, eg gjørdi ikki annað enn at hjálpa teimum, sum komu til mín," og hon varð eisini fríkend. Tað kundi verið nógv skrivað um Trinu, og tað fer kanska eisini at verða gjørt.

### Lávus náddi ikki at síggja seinasta barnið

Lávus og Susanna Maria fingu skjótt sjey børn. Tað vóru tvey og trý ár millum teirra. Men í 1919 verður Susanne Maria aftur við barn. Tað er um reppið, um maðurin er farin avstað, áðrenn hon skal eiga. Men tað klárar hann ikki. Lávus fer avstað 16. juni, og Susanna Maria eigur fimm dagar seinni, tann 21. juni. Lávus kemur tískil ongantíð at síggja dóttrina. Ein pápabeiggi hansara Dánjal Jákup Hovgaard var eisini við Karen, og hetta gjørdi vanlukkuna fyri húskið enn størri.

Seinni verður so staðfest, at eingin pápi kemur aftur. Gentan verður uppkallað eftir báðum foreldrunum Laura Susanne, og hon er tað einasta av systkjunum, sum enn er á lívi. Mamman var 46 ár, tá ið hon fekk hana. Tað varð sagt, at tað vóru tríggjar "gamlar" mammur í Hovi, og tær vóru allar brandar.

Tað var sera lítið av hjálp at fáa, serliga um jørð var í húsinum. Sýslumaðurin kom at kanna viðurskiftini, og hann metti, at tey vóru ov væl fyri til at kunna fáa hjálp, tí tey áttu ov nógva jørð! 11 gyllin vóru í húsinum.

Beiggi Lávus, Danjal, kallaður Danjal í Smiðjuni, kempaði alt hann kundi fyri børnini, men til fánýtis. Annars søgdu børnini, at tey komu ongantíð at mangla nakað. Tað munaði væl, tá ið elsti sonurin Magnus fór til sjós og legði sína inntøku til húsið. Ein dóttir hansara er Sólva, gift við Atla Dam.

Einasta hjálp tey fingu var ein 50-krónuseðil, sum kom sendandi frá prestinum Grøn í Kvívík.

Tað var skjótt, at vanlagnan aftur vitjaði hetta hús. Tann 23. oktober 1925 doyr Susanna, 51 ára gomul. Tveir dagar seinni doyr dóttirin Katrina, sum var uppkallað eftir ommuni. Tær fóru báðar til gravar sama dag og fóru í somu grøv.

Hetta var hart fyri børnini. Hildið var, at tað var ringast fyri tey, sum vóru so stór, at tey skiltu rættuliga, hvat tey høvdu mist. Maria, mamma Goje, segði, at eingin kom yvir at missa mammuna sum ung.

### Pápabeiggin tekur um endan

Nú vóru bæði foreldrini deyð, og yngsta barnið var fimm ára gamalt.

Tá hendi tað sjáldsama, at tann sum tók húsið uppá seg var Danjal, ógifti beiggi Lávus, eisini kallaður Beiggin. Tað hevði altíð verið sera góð viðurskifti teirra millum.

Danjal arbeiddi tá á bedingini á Tvøroyri. Lønin var 24 oyru um tíman. Hetta var ikki nógv. Eina ferð fóru teir í verkfall. Tá komu 2 oyru uppá tímalønina! Men hóast hesa lítlu løn keypti hann fleiri gyllin í jørð.

Danjal var ein hegnismaður, dugdi at umvæla alt møguligt, og tók hond í har sum tað tørvaði.

Goje minnist, at hann var hvønn einasta dag inni hjá teimum, táið hann var blivin gamal. Hann greiddi ofta frá umstøðum í gomlum døgum. Øll virdu hann. Hann læs meira enn tey flestu. Tá Njarðlingur kom úr Danmark var eitt bókaskáp umborð. Har vóru allar millum aðrar bøkur allar Frembøkurnar. Hann las tær allar. Hann var ein sera vitandi maður, eisini um tað, sum var frammi í tíðini.

Á Tvøroyri búði hann hjá Agnas, ið tók ímóti logerandi. Har búði Petur Mohr Dam eisini tá. Teir tosaðu nógv um politikk, eisini um ellisrentu. Danjal spurdi, hvør ið skuldi gjalda ellisrentuna. Hann kundi snøgt sagt ikki skilja, at tað skuldi



Hendrik, beiggi Niels, og Ingeborg Tausen, foreldur Ingu, gift við Torkil Beder, prest. Hendrik gekk burtur við Grasinum



*Danjal í Smiðjuni millum Volmar, sonur Agnes, sum hann búði hjá á Tvøroyri og Andreu Strøm, sum var fosturdóttir Agnes*



*Systrarnar Marin Elisabeth og Maria, døtur Súsannu og Lávus. Maria er mamma Goje, sum er ein kelda til hesa frásøgn*



*Døtur Niels Tausen vóru Nathalia, Anna Sofía og Sanna*